## Byggja í Lamba

Runavíkar kommuna hevur eftir tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini givið Jeffri Johannesen í Lamba loyvi at byggja fýra samanbygd hús í bygdini. Tað samtykti býráðið á seinasta fundi. Húsini skulu byggjast á einum stykki, sum kommunan eigur, men býráðið hevur samtykt at frábýta fýra stykkir, sum verða 300 fermetrar hvørt. Í samtyktini treytar býráðið sær, at byggingin skal lúka treytirnar í byggisamtyktini hjá kommununi.

## Góður rognaprísur

Nú rognatíðin er byrjað, eru marknaðarviðurskiftini góð, tí eftirspurningurin er stórur og prísurin góður. Føroysku keypararnir vilja eisini fegnir hava rogn, og í seinastuni er prísurin hækkaður munandi. Keypararnir bjóða umleið 12 krónur fyri upsarogn, og prísurin á toskarognum liggur millum 15 og 20 krónur fyri kilo. Seinastu mánaðarnar hevur Løgtingið tosa um at lóggeva rogn upp á land, men meiriluti hevur ikki verið fyri tí.

# Ævintýragransking í Avstralia

**Ein heilt vanligur tími í skúlanum var byrjanin til eina ævintýrferð hinumegin heimin hjá 14 ára gamla Andrias Fredrikssen úr Vestmanna. Hann var so heppin í fjør at vinna eina kapping fyri skúlabørn í øllum Danmark, og herviða vann hann sær eitt pláss umborð á rannsóknarbátinum Vædderen, tá ið danska rannsóknarferðin Galathea 3 vendi nøsina móti Avstralia**




*Andrias Fredrikssen helt ein sera áhugaverdan fyrilestur um rannsóknarferð sína í Avstralia við Galathea 3*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

RANNSÓKNARFERÐ

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

- Eg havi nógv at takka mínum lærara fyri, sigur Andrias Fredrikssen eftir at hava hildið ein finan fyrilestur fyri hugtiknum javngomlum skúlanæmingum í Norðurlandahúsinum um sína tíð umborð á danska vaktarskipinum Væddaranum á Galathea 3 rannsóknarferðini. Hetta sigur hann, tí at lærarin ein heilt vanligan tíma í Vestmanna skúla í fjør, hevði avgjørt, at nú skuldi flokkurin hjá Andrias royna at koma við á ferðina.

- Eg ánaði ikki, hvat Galathea var fyri nakað, so tá ið eg fekk ein teldupost, ið segði, at eg var komin við í finaluna um at sleppa við, var eg sera bilsin, sigur Andrias.

Finalan hjá Andrias, ið var í Føroyum í August í fjør, gekk so væl, at Andrias var valdur við, og so byrjaði ævintýraferðin.

### Fantastiskur túrur

- Eg visti ikki ordiliga, um eg tímdi við. Men eg eri glaður fyri, at eg fór. Hetta var ordiliga spennandi, og vit granskaðu millum annað í havbotninum, ozonlagnum og ymsum fiskasløgum, sigur Andrias.

Umframt Andrias og hini 6 donsku skúlabørnini, vóru ein ørgrynna av herfólki, miðlafólki og granskarum við á ferðini. Serliga minnist Andrias aftur á, tá hann fór út í gummibáti við kavarum hjá danska herinum.

- Vit sóu ein stóran finna koma ímóti okkum. Eg trúði tað var ein hávur, og var eitt sindur illa við. Men tað var ein ordiliga stórur fiskur. Hann var 2 metrar til longdar, og vigaði eini 2 tons. Danir vildu fegin hava við til Keypmannahavnar, men hann slapp tíanverri burtur frá okkum, greiðir Andrias frá og flennur.

### Hitti systir Mary

Hóast ferðin var spennandi, so hevði Andrias ikki tonkt sær at verið granskari.

- Nei, tað eri eg alt ov ótolin til. Tað tekur eina evigheit frá, at man granskar til man finnur nakað úrslit. So tað er ikki nakað fyri meg, sigur Andrias avgjørdur.

Men fríløturnar tey høvdu í Avstralia var avgjørt nakað fyri Andrias. Millum annað vitjaðu tey ymsar djóragarðar, har tey sóu so forkunnug djór sum hávar og wombatar. Eisini hitti Andrias systir krúnprinsessu Mary.

- Eg minnist ikki ordiliga hvussu hon eitur, men tað var stuttligt at síggja hana, sigur Andrias.

### Avgjørt farið aftur

Nú ein tíð er liðin, síðani Andrias er komin aftur úr Avstralia, heldur hann avgjørt, at hetta er nakað fyri ungdóm úr Føroyum.

- Um eg slapp at velja, so hevði eg avgjørt farið við aftur. Ein lærur nógv, og tað er sera spennandi. Hóast man er langt burtur, og tað kann rulla illa, og at man leingist heim viðhvørt, so vildi eg ikki verið hetta fyri uttan. Hetta fari eg ongantíð at gloyma, sigur Andrias at enda.

### FAKTA

Rannsóknarferðin hjá Andrias við Galathea 3 hevur søguligar røtur í teimum báðum undanfarnu Galathea rannsóknunum 1 og 2, ið ávikavíst vóru gjørdar í 1847 og 1950. Báðar tær fyrru rannsóknarferðirnar sigldu eisini runt jørðina og høvdu týdningarmikil rannsóknarúrslit heim aftur við sær.

Ætlanin við ferðini er at vekja áhuga millum ungdómin fyri gransking, og at fáa fleiri at starvast innan framtíðargransking, og menna áhugan fyri náttúruvísindini millum ungdómin. Rannsóknarferðin fer eisini at fáa til vega virðismikla vitan um náttúrufyribrigdi, altjóðagerðina og tað hátøkniliga samfelagið.

*Kelda: www.mmr.fo*

# Tríggjar milliónir til gamla vaskaríið

**Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á býráðsfundi mánakvøldið at mæla býráðnum til lata tríggjar milliónir til at snøgga um gamla vaskaríið í Tórsgøtu. Jógvan Arge, formaður í nevndini sigur, at enn er ikki avgjørt, hvat húsið skal nýtast til, men at ymisk mentanarlig endamál eru hugsandi**

UMBYGGING

*Eyðhild Jacobsen*
*eydhild@sosialurin.fo*

Grannin hjá Sosialinum, gamla vaskaríið í Tórsgøtu, ið hevur sæð betri dagar, fer í næstum ikki at verða til at kenna aftur, tí væntandi verða umbygging framd á økinum fyri 3 milliónir krónur. Klædningur, takvindeygu og hurðar skal alt gerast av nýggjum, umframt at tað annars verður fríðka um húsið við nýggjum oljutangum, septiktangum og hitaskipanum. Hetta er ein gomul ætlan, ið nú væntandi fer av bakkastokki.

– Fyri tveimum árum síðani samtykti býráðið at fara undir hesa umvæling í stigum. Hetta er so fyrsta stigið, ið verður mett at kosta 3 milliónir krónur, sigur Jógvan Arge.

### Mentanarligt endamál hugsandi

Húsið er gamalt, umleið 200 ár gamalt, so tað er eftirhondini vorðið eitt søguligt hús. Hvat húsið skal nýtast til, tá ið tað er umbygt, er ikki endaliga samtykt enn.

– Enn er ongin endalig avgerð tikin um, hvat húsið skal nýtast til, men tað er væl hugsandi, at tað verður brúkt til mentunarlig endamál, sigur Jógvan Arge.

Umvælingin verður gjørd eftir sama leisti, sum umvælingin á Müllers Pakkhúsi við Vestaru Vág.



*Jógvan Arge váttar fyri Sosialinum, at í næstum verður farið undir at fríðka gamal vaskaríið í Tórsgøtu*

*Mynd: Jens K. Vang*